# Vettel nýggjur heimsmeistari

**KAPPKOYRING** Kappingarárið í Formel 1-kappkoyring fekk ein spennandi og dramatiskan enda í Abu Dhabi, har tað endaði við, at 23 ára gamli týskarin, Sebastian Vettel, gjørdist yngsti heimsmeistari nakrantíð

Hilmar Jan Hansen

Undan Grand Prix-kappingini í Abu Dhabi, sum er høvuðsstaður í Sameindu Arabisku Emiratunum, høvdu fýra mans møguleikan at gerast heimsmeistari. Av teimum hevði Fernando Alonso í Ferrari besta møguleikan, tí endaði hann millum fýra teir fremstu, var hann heimsmeistari. Hinir vóru Mark Webber og Sebastian Vettel, báðir í Red Bull, og Lewis Hamilton í McLaren.

Tá avtornaði, meiri ella minni klossaði Alonso alt burtur, so hann endaði á einum sjeyndaplássi, ið altso var trý pláss frá heimsmeistaraheitinum. Tað var heldur ikki, fyrr enn boðini komu um hansara sjeyndapláss, at tey í Red Bull kundu fegnast.

– Ótrúligt! Eg elski tykkum, segði Sebastian Vettel, meðan sjónvarpsmyndirnar vístu, hvussu hann við grátinum í hálsinum tók seg til høvdið, tá Red Bull-verkfrøðingurin, Christian Horner, umvegis samtaluanleggið gav honum eittans orðið í oyruni: Weltmeister!

## Dramatikkur

Tann bert 23 ára gamli Vettel, sum tíggju ferðir í ár er byrjaður í »pole position«, var tryggur í hesi seinastu kappkoyringini, og honum nýttist ikki at taka nakrar kjansir. Sostatt endaði hann sum yngsti heimsmeistarin nakrantíð, bara fýra stig framman fyri Fernando Alonso, og samstundis gjørdist Red Bull eisini samanlagdur heimsmeistari fyri konstruktørar.

Tað var annars um reppið, at kappkoyringin í Abu Dhabi fór í søguna fyri nakað heilt annað, tí longu í fyrsta umfarinum var ein sorgarleikur á gáttini, tá sjeyfaldi heimsmeistarin, Michael Schumacher, varð árendur av Vitantonio Liuzzi. Bert fáir sentimetrar gjørdu, at Schumacher ikki – bókstaviliga talað – fekk høvdið kvett av, tá bilurin hjá Liuzzi kom inn yvir bilin hjá týskaranum.

Henda dramatiska hending spældi kortini væl av, og Michael Schumacher slapp frá hendingini uttan stórvegis mein. Tí verður tað ítrótturin, ið tekur yvirskriftirnar hesa ferð, og tað kunnu so øll fegnast um.

## Best tá tað taldi

Á tíðindafundinum aftaná var nýkosni heimsmeistarin framvegis fámæltur, og tað skiltist á øllum brøgdum, at hann kanska enn ikki til fulnar hevði fatað, at hann hevði vunnið HM í Formel 1 upp á tann mátan, allir kappkoyrarar ynskja tað – við sigri í allarseinastu kappingini.

– Eg eri málleysur. Eg visti framvegis ikki, um tað helt, fyrr enn eg fekk rópið í oyrasnigilin um, at eg var heimsmeistari, segði Sebastian Vettel, ið so smátt tordi at fegnast uppaftur meira:

– Hetta hevur verið eitt øgiliga hart kappingarár, bæði fyri meg sjálvan og liðið, og nógv hevur staðið á, bæði kropsliga og sálarliga. Og hóast vit hava trúð upp á møguleikan, so er tað altso heilt fantastiskt, at eg hetta kappingarárið bara skuldi vera á odda ta einu ferðina – og tað var nú, tá tað veruliga taldi.

Millum teirra, ið bert hava rósur at bera Vettel, nú enn eitt kappingarár er av, er 41 ára gamli landsmaður hansara, Michael Schumacher, ið eftir skelkandi dagin dugdi at samgleðast við Vettel, sum bert er annar týskarin – aftan á Schumacher – sum er Formel 1-heimsmeistari.

– Eg eri sera fegin hansara vegna, tí hetta hevur eitt hart ár hjá honum. Men hann hevur uppiborið tað, tí hann er ein stórur kappkoyrari og ein fantastiskur persónur, segði Schumacher.

*hilmarjan@sosialurin.fo*



# Heðin vil leypa á

**FÓTBÓLTUR** Ársins venjari, Heðin Askham hevur havt eitt gott fótbóltsár, har hann hevur vunnið steypagull og silvur í landskappingini, umframt at hava góð úrslit við U-21 landsliðnum. Álopsfótbóltur er vørumerki.

Heri Simonsen

Tann siðiligi og væl funderaði høvuðsvenjarin hjá EB/Streymi er skjótur at geva øðrum lut í heiðurinum, nú hann er valdur ársins venjari av hinum venjarunum, liðskiparunum og ítróttarpressuni. – Tann fyrsti maðurin sum eg havi hug at nevna er hjálparvenjarin, Finnbjørn Zachariasen. Finnbjørn er maðurin, sum eg havi sparrað við í alt ár, og vit hava eina ótrúliga góða kemi. Finnbjørn hevur verið sera týðindi fyri meg. Eg vil eisini nevna formannin í EB/Streymi, Rólant Højsted, sum eisini hevur verið góður at sparra við, og hevur altíð lagt oyra til og tikið til eftirtektar tað sum vit ynska, og hevur altíð hjálpt tað hann kann, slær Heðin Askham fast, tá vit seta honum stevnu undir Fjalli í vesturbýnum í Havn.

## Tað sosiala hevur eisini týdning

Heðin undirstrikar eisini, at liðleiðarnir, massørarnir og fysioterapeutarnir hava eisini sín stóra lut í teimum úrslitunum, sum EB/Streymur hevur rokkið. – Hini sum ganga rundan um okkum við Margáir hava eisini ógvuliga nógv at siga í tí smáa. Køkurnar hava fingið nógva umrøðu, men tær hava eisini havt nógv at siga fyri hópin, sum ein savningarmiðdepil, aftaná venjingar í vikuni. Árið hjá okkum hevur verið ógvuliga gott sosialt, greiðir Heðin sannførandi frá, eisini fyri at leggja herðslu á, at tann parturin hevur stóran týdning, tá um eitt fótbóltslið ræður. – Eg haldi avgjørt, at alt hetta smittar av út á vøllin.

## Frástøðan er ein avbjóðing

Neyvan er tað nakað fótbóltsfelag í Føroyum, sum fevnir so víða, tá talan er um eitt landafrøðiligt økið. Spælarar og viðhaldsfólk strekkja seg líka úr Kollafirði norður gjøgnum alt Sundalagið, og líka til Gjáar. – Henda frástøðan gevur eina eyka avbjóðing. Tú kanst ikki bara kalla mennirnar inn í tíð og ótíð. Tá ein leggur venjingartíðir til rættis, so má ein veruliga halda hesar venjingartíðirnar. Tá vit spæla dystir, so savna vit spælarnar fimm korter áðrenn dystarbyrjan, meðan feløgini í Havn brúka meir leistin, at spælarnir allir eta saman, og so hvíla teir aftaná máltíðina. Men hetta ber illa til við Margáir, tí vit hava ikki nakað rúm, har spælarnir kunnu hvíla seg. Spælarnir eta, fyrireika seg og hvíla heima, og møta so við Margáir fimm korter áðrenn dystarbyrjan.

## Góður uppbakningur

Heðin er hugtakin av tí stóra felagsandanum, sum er í EB/Streymi: - Eg haldi, at stuðulin til felagið er sera stórur, og tað eru veruliga nógv fólk, sum hava eitt tilknýtið til felagið. Hesi arbeiða øll hart í felagnum, tað er veruliga eitt stórt tól sum skal til, fyri at fáa EB/Streym at koyra. Og eg haldi veruliga, at tær góðu kreftirnar har norðuri, eru veruliga góðar, staðfestir ársins venjari, sum ikki sparir uppá rósirnar til øll tey sum geva sítt íkast til, at tað gongst EB/Streymi væl.

## Spæla álopsinnaðan fótbólt

Heðini dámar eisini væl hugsanarháttin hjá sundalagsfólki, tá um fótbólt ræður: - Vørumerki hjá EB/Streymi er at teir spæla veruliga góðan fótbólt. Eg havi eisini veruliga lagt mær í geyma at framala gott fótbóltspæl, og at spæla álopskendan fótbólt, greiðir Heðin frá, og hann dylur ikki, at hann stórtrívist í einum umhvørvi, sum hevur eina so grundleggjandi, jaligan fótbóltshugburð. – Vit vilja gjarna spæla høgt uppi á vøllinum, og spæla tann fótbóltin, sum áskoðarnir dáma at hyggja eftir. Tað er hugsandi, at tað sum hevur tømt fleiri áskoðaraskýli í Føroyum er, at fleiri lið spæla alt ov verjukendan fótbólt, og tað eru eisini ógvuliga fá, sum tíma at hyggja eftir slíkum fótbólti. Heðin dylur ikki, at hann deilir hesa fatanina, og at tað er einki so keðiligt, sum at fara til ein fótbóltsdyst, har bæði liðini grava seg niður. – Og so eru tað hesir dystirnir við longum bóltum, tað er næstan sum at hyggja eftir einum tennisdysti, slær ársins venjari fast. – Sjálvur vil eg spæla fótbólt við góðum sendingum, og liggja høgt uppi á vøllinum! Komandi fríggjadag klokkan 15.15 verður ein longri útvarpssamrøða við Heðin Askham á Rás2.

*heris@sosialurin.fo*

*Hoyr samrøðuna við Heðin Askham á Rás2 fríggjadagin klokkan 15.15*